## Funnu mini-Stonehenge



Hálvan annan kilometur frá tí kenda Stonehenge hava bretskir fornfrøðingar funnið nakrar steinar, sum eftir øllum at døma hava verið grundarsteinar undir størri steinum, sum hava staðið har eina ferð í tíðini. Fornfrøðingarnir halda, at steinarnir hava myndað ein runding eins og Stonehenge, men at hann hevur verið minni. Teir hava givið steinunum navnið Bluehenge, tí teir eru bláir á liti, skrivar Reuters. Granskarar hava fyrr sagt, at tað elsta av Stonehenge er frá umleið 3.100 fyri Kristi føðing, og teir halda, at tað elsta av teirri minnu útgávuni er frá somu tíð.

## Trupul uppgáva

Sosialistaflokkurin í Grikkalandi, sum vann stóran sigur á teimum konservativu, fær nóg mikið at takast við, nú hann skal skipa stjórn. Politisku eygleiðararnir siga, at flokkurin skal royna at stýra einum landi, sum var um at steðga upp orsakað av altjóða fíggjarkreppuni, og sum verður roknað sum eitt tað veikasta landið í evru-bólkinum. Millum annað hevur landið ta næststørstu uttanlandsskuldina, og grikska vinnulívið stendur seg ikki í kappingini við vinnuna í hinum ES-londunum. Tí fáa sosialistarnir og George Papandreou, floksformaður, nóg mikið at takast við, skrivar AP úr Athen.

# Ymisk sjónarmið um inntøkutrygd



**Enn veit eingin um nevndin, sum landsstýrið hevur sett til at gera tilmælið um, hvussu inntøkutrygd fiskimanna skal skipast í framtíðini, fer at semjast og koma undir land við einum uppskoti, so nýggja skipanin kann setast á kjøl fyrst í komandi ári**

INNTØKUTRYGD
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Heimurin er í eini broytingartíð. Tað eru Føroyar eisini. Nú vil politiski myndugleikin í Føroyum broyta ta skipan, sum hevur verið virkin í meira enn seksti ár. Hetta er skipanin við inntøkutrygd fiskimanna, og uppi í hesi trygd liggur eisini forskotstrygdin hjá langfarafiskimonnum.

Fiskimenn og feløg, sum varða av fiskimonnum, halda, at inntøkutrygdin er ein vælvirkandi skipan, sum veitir monnum trygd, tá fiskiskapur og/ella fiskaprísir svíkja.

Tá gongdini í fiskiskipa- og útróðrarvinnuni er á eini leið, kostar almenna mynstulønarskipanin einar 18-20 miljónir krónur um árið, men í ár, nú serliga fiskaprísirnir hava verið vánaligir, og fiskiskapurin eftir eitt nú toski og hýsu eisini hevur verið svikaligur, fer skipanin helst at kosta tí almenna stívliga 40 miljónir krónur, tá árið er liðugt.

### Neyðugt við trygd

Eingin tímir at sigla og arbeiða fyri einki, og um



*Viðberg Sørensen*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

eitt nú línu-og útróðrarfloti ikki loysa, koma ikki tey fiskasløg til virkingar, sum virkini og marknaðurin úti í heimi eftirspyrja.

Við fiskiskapi hevur altíð gingið upp og niður, og soleiðis fer tað ivaleyst altíð at verða.

Teir "klóku" heilarnir siga, at veiðitrýstið er ov stórt, og tí eru eitt nú toskur og hýsa so illa fyri.

Fyri stívliga 10 árum síðan fingu vit eina fiskidagaskipan, sum bæði vinna og fiskifrøði góvu blátt stempul. Nógv hevur verið frammi um, hvussu politiski myndugleikin hesi árini hevur latið hesa skipan avskeplast ella skeiklast, men tað er samstundis ein sannroynd, at talið av fiskidøgum er munandi skert, síðan henda skipan sá dagsins ljós.

Fiskifrøðin sigur, at veiðitrýstið framvegis er ov stórt, tó at skerjingar eru í dagatali á hvørjum ári. Ávísir politiskir flokkar og kanska serliga persónar eru farnir at dansa etir "pípuni" hjá fiskifrøðini, samstundis sum teir vísa á, at nógvir fiskidagar liggja óbrúktir. Tí er bara, siga teir, at skerja dagatalið enn meira, tá hetta kortini onga ávirkan hevur á møguleikarnar hjá skipum og bátum.

Logikkurin sigur tó, at tá skipanini í sínari tíð toldi, at allir dagar verða brúktir, eigur tað eisini at merkja, at trýstið IKKI er ov stórt, tá so nógvir dagar liggja óbrúktir.

Tí skuldi – alt annað líka – ikki verið neyðugt við skerjingum á hvørjum ári, sum lagt hevur verið upp, síðan fiskidagaskipanin sá dagsins ljós.

### Oyða við studningi

Ein av teimum, sum talar fyri, at inntøkutrygdin eigur at broytast og verða løgd út til partarnar á arbeiðsmarknaðinum, fiskimenn og reiðarar, er búskaparfrøðingurin, Kári Petersen.

Hann heldur tað vera skeivt, at tað almenna veitir stuðul, tá fiskiskapurin svíkur, tí tað er tað sama sum at stuðla niðurfisking av fiskastovnunum, sum bara ger umstøðurnar hjá fiskiflotanum uppaftur truplari.

Kári Petersen heldur, at tá fiskastovnar eru illa fyri, hevði tað verið betri, um fiskimenn heldur fóru uppá land at gera okkurt annað – enn at fiska og fáa almenna inntøkutrygd fyri at troyta fiskastovnarnar uppaftur meira.

### Ikki so einfalt

Ein annar, sum hevur eina aðra hugsan um hesi viðurskifti, er formaðurin í Føroya Reiðarafelag, Viberg

# Lagnan hjá seks fólkum í óvissu

**- Politiski viljin er, at skipanin við inntøkutrygd, sum vit umsita, skal leggjast út til partarnar á arbeiðsmarknaðinum. Vit vita ikki meira enn tað, vit frætta um fjølmiðlarnar, sigur deildarstjórin á Lønjavningarstovuni, Hanni Thomsen**

INNTØKUTRYGD
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Á Lønjavningarstovuni, sum húsast á Heykavegi 6 á Hálsi, har Fiskimálaráðið annars heldur til, arbeiða seks fólk.

Stjóri er Hanni Thomsen, sum hevur verið deildarstjóri har seinastu 5-6 árini. Hann hevur annars verið í starvi hjá gamla Lønjavningargrunninum heilt síðan 1975.

Nú politiski viljin er, at øll skipanin við mynstuløn og inntøkutrygd skal broytast og við tíðini leggjast út til partarnar á arbeiðsmarknaðinum, reiðarar og fiskimenn, eru tað ikki bara fiskimenn, sum standa spyrjandi.

Tey seks fólkini, sum arbeiða á Lønjavningarstovuni, vita lítið meira um ætlaðu broytingarnar enn tað, sum hoyrist alment í fjølmiðlunum. Tey vita, at landsstýrið hevur sett eina nevnd at arbeiða við tilmæli um broytingar.

- Vit hava skilt, at politiski viljin er, at skipanin, sum vit umsita í dag, skal leggjast út til partarnar á arbeiðsmarknaðinum.

Hanni Thomsen sigur, at hann veit einki at siga um, hvør lagnan hjá teimum seks fólkunum verður, nú ætlanin er, at nýggja skipanin ætlandi skal umsitast av pørtunum á arbeiðsmarknaðinum.

Spurdur, um starvsfólkini á Lønjavningarstovuni møguliga kundu fingið onkrar aðrar uppgávur í Fiskimálaráðnum, sigur hann, at slíkt hava tey einki hoyrt um.

- Nei, vit vita einki meira um ætlaðu broytingarnar enn tað, sum fjølmiðlarnir bera frá politikarum og teimum, sum í dag eru tengd at arbeiðnum at endurskoða mynstulønarskipanina og inntøkutrygdina, sigur deildarstjórin, Hanni Thomsen.